# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

44 bátar seldu góð 48 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum fríggjadagin. Av yvirlitinum á síðuni sæst, hvussu nógv einstøku bátarnir landaðu, eins og býti av samlaðu veiðuni framgongur

| Syslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 142 |
| FD 16 | TINDUR | BOTNTROL | 406 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 4.232 |
| FD 616 | RANDI | BOTNTROL | 828 |
| FD 900 | HØVNIN | LÍNA | 3.602 |
| FD1085 | FUGLFIRÐINGUR | LÍNA | 88 |
| FD1137 | RIVTANGI | SNELLA | 121 |
| KG 123 | HÁENNI | LÍNA | 4.468 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 3.941 |
| KG 507 | SØKIN | LÍNA | 3.217 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | SNELLA | 2.113 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 2.160 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 2.645 |
| KG 602 | LÍÐHAMAR | LÍNA | 1.070 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 1.739 |
| SA 211 | SKARÐHAMAR | BOTNTROL | 56 |
| TG 339 | BÁRAN | SNELLA | 1.382 |
| TG 40 | KAMBUR | SNELLA | 2.100 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 1.788 |
| TN 198 | KVÍVÍKS ELSBA | LÍNA | 479 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 368 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 2.825 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 890 |
| TN 992 | ÁRNASTEINUR | LÍNA | 1.594 |
| TN1062 | HVÍTHAMAR | | |
| | SP/F JÓNLEYG | BOTNTROL | 27 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 387 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 311 |
| VA 164 | NIKLÁI | SNELLA | 426 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 222 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | SNELLA | 133 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 549 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 160 |
| VA 295 | THOVA | SNELLA | 173 |
| VA 310 | STREYMNES | SNELLA | 356 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 179 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | SNELLA | 263 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 401 |
| VA 350 | SIRIÐ | SNELLA | 461 |
| VA 50 | TØÐUBÓNDIN | SNELLA | 111 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 404 |
| VA 717 | STÍGANES | SNELLA | 282 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 560 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 352 |
| VN 136 | SÆVAR | SNELLA | 317 |



| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| BROSMA 0 | 130 |
| BROSMA 1 | 13 |
| BROSMA 2 | 3 |
| BROSMA 3&4 | 26 |
| HÝSA 0 | 13 |
| HÝSA 1 | 15 |
| HÝSA 2 | 114 |
| HÝSA 3 | 2.187 |
| HÝSA 4 | 89 |
| HÝSA 5 | 65 |
| HAVTASKA 0 | 19 |
| HVASSKVOYSA | 2 |
| HVÍTINGUR 0 | 36 |
| KALVI 1 | 88 |
| KONGAFISKUR 0 | 31 |
| KONGAFISKUR 2 | 74 |
| KONGAFISKUR 3 | 2 |
| LÁLLA | 20 |
| LIRI | 8 |
| LIVUR | 36 |
| LONGA 0 | 206 |
| LONGA 2 | 4 |
| LONGA 4&5 | 18 |
| LONGUROGN | 18 |
| SIL | 437 |
| SKØTA | 18 |
| SKRUBBA | 2 |
| STEINBÍTUR | 94 |
| TOSKAROGN | 1.819 |
| TOSKUR 1 | 428 |
| TOSKUR 2 | 4.588 |
| TOSKUR 3 | 14.750 |
| TOSKUR 4 | 14.704 |
| TOSKUR 5 | 7.823 |
| TUNGA 0 | 45 |
| UPSI 0 | 56 |
| UPSI 1 | 151 |
| UPSI 2 | 122 |
| UPSI 3 | 70 |
| UPSI 4 | 4 |

## Jørgen Niclasen á almenna vitjan

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Týsdagin byrjar almenna vitjanin hjá Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri í Norra. Hann skal vitja í Lofeten. Har verður fundur millum norska fiskimálaráðharran Otto Gregersen og Jørgen Niclasen

Á fundinum verður tosað um felags áhugamál og Jørgen fer eisini at tosa um rækjur við Svalbard. Føroyingar eru sera ónøgdir við, at fiskidagatalið er skert við Svalbard og Jørgen fer eisini enn einaferð vegna føroyingar at nýta høvi at mótmæla hesum.

Hósdagin og fríggjadagin verður eitt seminar um etikk og fiskivinnu og umframt fiskimálaráðharran, so skal eisini varabispur Bjarni Bech luttaka.

Jógvan Hugo Gardar journalistur verður í Lofoten og hann fer at skriva í Sosialinum um vtijanina hjá Jørgen.



# Slógv skal verða tøð

IRF megnar ikki at brenna stóru nøgdirnar av fiskaslógvi, sjúkum laksi og øðrum lívrunnum burturkasti. Tí verður í løtuni arbeitt við at finna eina skipan, so hetta slag av burturkasti kann endurnýtast sum tøð

UMHVØRVI
*John Johannessen*

Hvørt ár tekur IRF ímóti stórum nøgdum av lívrunnum burturkasti frá alivinnuni, fiskivinnuni og privatum húsarhaldum.

Men tað knípir hjá felagsskapinum at fáa alt hetta burturkast til høldar. IRF hevur einfalt ikki orku til at brenna lívrunna burturkastið.

Tí er felagsskapurin farin at kannað møguleikarnar fyri eini skipan, har stóru nøgdirnar av lívrunnum burturkasti verða gjørdar um til tøð.



*Brennistøðin í Leirvík klárar ikki at taka ímóti øllum lívrunna burturkastinum frá fiski- og alivinnuni. Tí er felagsskapurin farin at fyrireika verkætlan um at gera burturkastið um til tøð*

### Nógv niðurfyri

Á gamla Leirvíksvegnum stendur ein røð av tangum fullum av innvølum frá deyðum laksi, sum varð dripin í mars í fjør, tá ILA sjúkan rakti alistøðina, Alilaks, í Fuglafirði.

Brennistøðin í Leirvík fekk í mars í fjør 300 tons av innvøli frá alibrúkinum at brenna. Hóast eitt ár er liðið síðani, at laksurin varð dripin, er enn eitt sindur eftir. Brennistøðin kann nevniliga bert brenna eitt tons av hesum burturkasti um samdøgrið

IRF fær eisini stórar mongdir av lívrunnum burturkasti frá sokallaðum botnfellingarbrunnum frá fiskavirkjum, innvølir og skinn frá slakti av seyði um heystið og annað líknandi burturkast.

Umframt hetta, skal felagsskapurin eisini megna at brenna tiknan laks frá alivinnuni, um sjúkur, sum ILA sjúkan, aftur taka seg upp. Eisini hevði IRF fingið uppgávuna at brent stórar nøgdir av sjúkum seyði, um munn- og kleyvsóttin fór at herja í Føroyum.

### Turka burturkastið

IRF sigur í ársfrágreiðing síni fyri ár 2000, at felagsskapurin hevur gjørt vinnuni greitt, at tað er trupult at brenna stórar nøgdir av lívrunnum tilfari. Eisini sigur IRF, at um tey ikki høvdu hildið aftur við at tikið ímóti hesum tilfari, høvdu helst størri nøgdir komið.

Fyri at loysa trupulleikan, ætlar IRF at kanna, um tað ber til at finna eina samskipaða viðgerð av bæði rottangaevju og lívrunnum burturkasti frá virkjum.

Sambært IRF skuldi tað borið til at turka hetta burturkast á ein ávísan hátt, so tað verður til tøð, sum uttan stórvegis trupulleikar kunnu nýtast í landbúnaðinum.

IRF sigur seg vita um ymsar turkiskipanir, ið møguliga kunnu viðgera tilfarið. Men hetta eru lutfallsliga dýrar skipanir. Tí er IRF farið at kanna aðrar møguleikar við stuðuli frá Oljumálastýrinum.

# Smábátarnir vendu aftur



*Palli Jacobsen fór ongantíð avstað fríggjamorgunin, tí veðrið var so vánaligt, men hann vónar at sleppa út aftur í dag. Mynd: Eyðun Klakstein*

**Líkindini vóru so vánalig, at smábátarnir, sum æltaðu sær á Norðhavið fríggjamorgunin, vendu aftur**

FISKISKAPUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fríggjamorgunin lógu allir teir smáu snellubátarnir bundnir við kai í Klaksvík.

Nakrir av smáu bátunum vóru annars farnir avstað tíðliga fríggjamorgunin, men teir vendu aftur, tí tað var so ringt í sjónum.

Størru bátarnir komu á Norðhavið, og veðrið var brúkiligt hjá teimum.

– Eg fór ongantíð avstað í morgun, tí líkindini vóru so vánalig. Aðrir royndu, men veðrið var ikki til tað, sigur Palli Jacobsen, sum rør út við Krossteini.

### Góðan túr mánadagin

Báturin hjá Palla liggur við bátabrúgvarnar í Klaksvík, og hendan fyrrapartin er hann farin í holt við onkrar smærri umvælingar umborð á bátinum.

– Tað er altíð okkurt sum kann gerast ein slíkan dag sum í dag, tá vit ikki sleppa út, sigur hann.

Mánadagin var hinvegin ein góður dagur hjá Palli. Teir vóru tveir við Krossteini á Norðhavinum og fingu næstan 2700 pund.

– Á døgurða høvdu vit fingið eitt tons. Fyrrapartурin royndist væl, og fiskurin var stórur. Aftaná døgurða gekk minni væl, men samanumtikið var tað ein góður túrur, sigur hann.

### Avreiða á Uppboðssøluni

Palli hevur verið tríggjar túrar higartil, og hann vónar, at hann sleppur avstað aftur í dag.

Bátarnir í Klaksvík avreiða allir á Fisknamarknaðinum í Klaksvík, og tá allir bátarnir koma aftur ímóti kvøldi, er nógvur aktivitetur við Kósabrúnna.

– Tað gongur rættiliga væl við at sleppa fram at eftir tørni, sigur Palli Jacobsen.

Dagurin í gjár var eitt sindur meiri friðarligur á uppboðssøluni, tí tað vóru bara teir størru bátarnir, sum vóru úti.

## Grønlendingar kappast um krabbaveiðuna

Grønlendingar hava rættuliga ment seg innan krabbaveiðu og fleiri skip royna eftir krabba. Krabbaveiðan gongur í løtuni fyri seg í Suðurgrønlandi og rættulig kapping hevur tikið seg upp millum Nanortalik og Narsap um at virka krabban á landi. Hetta skrivar íslendska vevsíðan Interseafood.

Í Nanortalik er eitt virkið júst latið upp og í næstum letir eitt virkið upp í Narsaq. Eisini royna skip eftir krabba í Grønlandi og tey virka umborð.

## Norðmenn ala í Russlandi

Bodø(NTB) Stóri alarin Gigante AS í Bodø hevur sum fyrsta norska alifyritøkan fingið loyvi til at ala í Russlandi. Felagið ætlar at seta 2,5 –3 milliónir smolt út árliga og av hesum rokna teir við at vinna 17.000 tons av laksi í seks kilo klassanum, sum er beroknaður til russiska marknaðin, skrivar Interseafood.

Norðmenn hava seinastu tvey árini samráðst um at fáa hesi rættindi og í hesum sambandi hava teir stovna eitt felag, nevnt Gigante Russland, sum skal standa fyri virkseminum. Norðmenn eiga 70 prosent í hesum felag og russar restina.